# Løgmaður misnýtir sítt vald

**– Sambandsveljarar eru forargaðir um tað, sum er hent, sigur Lisbeth L. Petersen.**

POLITIKKUR
*Vilmund Jacobsen*

Sambandsflokkurin skuldi á fundi í gjár kl. 13 umrøða politisku støðuna, nú løgmaður, Anfinn Kallsberg, hevur boðað frá, at samgongan heldur fram, og at Javnaðarflokkurin og Miðflokkurin eru vælkomnir uppí samstarvi, men ikki Sambandsflokkurin.

– Fyribils hava vit í andstøðuni so eina skrivliga avtalu um, at vit standa saman, og í kjakinum í útvarpinum týskvøldið hefti eg meg við, at ikki minst Jenis av Rana legði stóran dent á hetta, sigur Lisbeth L. Petersen.

Hon leggur dent á, at Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og Miðflokkurin gjørdu hesa avtalu, tá ið tað fréttist, at Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin vóru gingnir saman.

– Við avtaluni vildu vit vísa á, at vit eisini eru 16, og at samgongan ikki kann ignorera hendan veruleika.

### Mangir leikir í longum talvi

Spurd, um hon heldur, at hendan avtalan fer at halda, nú Javnaðarflokkinum og Miðflokkinum stendur í boði at koma uppí samgonguna, sigur hon, at tað vil hon vóna, at hon ger.

– Í politikki veitst tú ongantíð, hvat hendir, men í mínari verð er ein avtala ein avtala, sum eigur at vera hildin.

Men fer andstøðan so eisini at standa saman ímóti samgonguni, eftir at tingarbeiðið er tikið uppaftur, nú tað stendur á jøvnum í tingmannatali, spurdu vit Lisbeth.

– Ja, eg havi skilt, at avtalan eisisi fevnir um tíðina eftir, at tingið er komið saman aftur, og tí verður tað torført hjá samgonguni, sum bert hevur helmingin av tinginum aftanfyri seg, at fremja síni mál, sigur hon.

Lisbeth heldur, at hetta er ein ógvuliga keðilig og fastløst støða.

– Eg haldi avgjørt, at løgmaður átti at latið aðrar flokkar roynt seg, áðrenn hann avgerð at halda fram við ongum meiriluta aftanfyri seg, og tá ið hann ikki ger tað, haldi eg, at hann misnýtir sítt vald sum løgmaður.

### Veljarin altíð rætt

– Eg tulki valúrslitið soleiðis, at veljarin segði nei til førda politikkin seinastu fýra árini, men løgmaður, sum valkvøldið segði, at veljarin altíð hevur rætt, virðir ikki, at andstøðan fekk meira enn helmingin av atkvøðunum á valinum, 30. apríl.

Lisbeth sigur, at hevði samgongan fingið 51,1% av atkvøðunum og andstøðan bert 48,9, ivast hon ikki í, at hetta hevði verið brúkt til fyrimuns fyri sitandi samgongu og førda politikkin.

– Men nú tað er øvut, virðir løgmaður ikki avgerð Føroya fólks, sigur hon.

Atkvøðuslúkurin á løgtingsvalinum sigur, at sambandsveljarar, sum hon hevur tosað við, eru forargaðir um støðuna og halda ikki, at løgmaður ber seg rætt at.

Spurd, um hon hevði ætlað sær at verið løgmaður í eini samgongu, har Sambandsflokkurin var við, sigur Lisbeth L. Petersen at enda.

– Sambandsflokkurin hevur flestar atkvøður av øllum flokkum, og komu vit í samgongu, er tað náttúrligt, at vit vildu havt løgmann. Men vit hava onga avgerð tikið um, hvør skuldi sitið í løgmanssessinum sigur hon.

Á fundi mikudagin kl. 13 skuldi Sambandsflokkurin so umrøða politisku støðuna.



*– Løgmaður virðir ikki avgerð Føroya fólks, sum er eitt nei til førda politikkin seinastu fýra árini, sigur Lisbeth L. Petersen.*

# Hurðar framvegis opnar fyri breiðum samstarvi

**- Eg harmist um, at støðan er so fastløst, men samgongan er framvegis opin fyri einum breiðum samstarvi, og enn havi eg vónir um, at aðrir flokkar koma við í samgonguna, sigur Høgni Hoydal.**

POLITIKKUR
*Vilmund Jacobsen*

Hóast løgmaður hevur boðað frá, at sitandi samgonga fer at halda fram við 16 tinglimum aftanfyri seg, merkir tað kortini ikki, at hurðar eru lætnar aftur fyri einum breiðari samstarvi við eitt nú Javnaðarflokkin og Miðflokkin.

– Í dag er einki hent, sum týðir uppá tað, men vit hava framvegis ikki slept vónini um eitt breiðari samgongugrundarlag, og enn eru hurðarnar opnar til tess, segði Høgni Hoydal, tá ið Sosialurin tosaði við hann fyrrapartin í gjár.

Støðan er hon, at løgmaður hevur boðað frá, at sitandi samgonga heldur fram, men hon hevur bert helmingin at nývalda løgtinginum aftanfyri seg.



*– Eg skilji ikki, hví Javnaðarflokkurin og Miðflokkurin velja at seta seg uttanfyri, tá ið hurðarnar eru opnar fyri teimum at verða við í tí arbeiði, sum gerast skal, sigur Høgni Hoydal.*

– Sum út sær í løtuni, verður hetta ein minnilutastjórn, soleiðis sum vit kenna tær í øðrum londum, men vit kunnu eisini kalla hetta eina javnleikastjórn, sigur Høgni Hoydal.

### Høgni harmast

Hann ásannar, at tað var ikki hetta, sum Tjóðveldisflokkurin og samgongan annars helst vildi og harmast um, at politiska telvingin hevur ført til hesa fastlæstu støðu.

– Eg haldi, at um Javnaðarflokkurin óttaðist ójavnar samráðingar, nú vit frammanundan eru 16 aftanfyri samgonguna, so kundi flokkurin í minsta lagi møtt upp til samráðingar um møguligt samstarv. Men tað valdi flokkurin ikki at gera, og tað skilji eg ikki, sigur Høgni.

Hann vísir á, at hetta er ein heilt nýggj støða, sum flokkarnir hvør í síni lagi tosa saman um.

Spurdur, nær Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin fara at tosa um innihaldið í einum nýggjum samgonguskjali, sigur Høgni, at tað helst verður áðrenn tingið kemur saman mikudagin í komandi viku.

– Men eingin sigur, at hetta skal gerast fyri ta tíð. Nú fáa vit at síggja, hvat hendir næstu dagarnar, og tað kemur so eisini at hava týdning fyri arbeiði, sum gerast skal.

Høgni sigur, at tað vóru Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, sum gjørdu nógv umrøddu avtaluna, meðan Tjóðveldisflokkurin ikki var við í nakrari beinleiðis »alliancu«.

– Vit mæltu til at taka upp samráðingar við Javnaðarflokkin og Miðflokkin um samstarv við sitandi samgongu, tí vit mettu, at støðan annars kundi lasast føst, og tað er hetta, sum nú er hent, sigur Høgni.

Andstøðan hevur sagt, at avtalan millum Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin og Miðflokkin stendur við, til ein formansrunda hevur verið. Hetta merkir ivaleyst, at andstøðan verður tung at »dansa« við hjá samgonguni, tá ið tingarbeiði verður tikið uppaftur.

Høgni ásannar, at hetta er ein keðilig støða og vónar, at Javnaðarflokkurin og Miðflokkurin eru so mikið at sær komnir, at teir vilja verða við í landsins stjórn.

– Eg skilji ikki, hví hesir flokkar velja at seta seg uttanfyri, tá ið hurðarnar eru opnar fyri teimum at verða við í tí arbeiði, sum gerast skal, sigur Høgni Hoydal.

### Eingin viðmerking

Tað er løgmaður, sum velir landsstýrismenninar og ein spurningur, sum hevur tikið seg upp í hesum sambandi, er, hvussu nógvar landsstýrismenn eitt nú Sjálvstýrisflokkurin fær. Flokkurin misti annað umboði á valinum, 30. apríl og situr nú bert við einum umboði á tingi. Í verandi samgongu hevur Sjálvstýrisflokkurin tveir landsstýrismenn, og fólk spyrja nú, hvussu verður framyvir.

– Handa spurningin havi eg onga viðmerking til, sigur Høgni Hoydal.

Hann vísir á, at nú løgtingsval hevur verið, hava vit eitt nýtt grundarlag og eitt nýtt tingmannabýti, men hann ynskir onga viðmerking at gera hesum viðvíkjandi.




BILFRAMSÝNINGIN 2002

Leygardagin 11. mai kl. 10.00-20.00
Sunnudagin 12. mai kl. 14.00-20.00
í høllini á Hálsi

Ókeypis atgongd



DAIHATSU · HONDA · SKODA · AUDI · MAZDA
SUZUKI · HYUNDAI · KIA · VW · DAEWOO
SUBARU · MG




Luttakarar:

ESMAR SIMONSEN · DB BILAR · BILASØLAN v/ ØSSUR JOHANNESEN · SP/F SUPERDEKK
BERG MOTORS · NORÐBIL · SUZUKI · SCANDITALIA

Ítróttar- og Samkomuhøllin á Hálsi

Sosialurin 311820